# Nøvn

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo



## Øssur Christiansen 60 ár



Leygardagin 24. apríl fyllir Øssur Christiansen í Vestmanna 60 ár.

Øssur er útbúgvin málari. Umframt arbeiða sum málari hevur hann eisini havt fleiri lastbilar, og seinastu 14 árini hevur hann havt náttarbussin, sum koyrir millum Vestmanna og Havnina í vikuskiftunum.

Øssur er eisini kendur frá 60-ara bólkinum Thunderbirds, har hann spælir gittar og syngur.

Øssur er sonur Helfred, f. Simonsen, úr Tjørnuvík, og Eivin Christiansen úr Kvívík. Øssur er giftur við Siggu Poulu, f. Olsen, úr Vestmanna. Tey eiga fýra børn: Magni og Eivin, sum búgva í Danmark, Høgni, sum býr í Vestmanna, og Gunrið, sum býr í Kollafirði.

Føðingardagin er Øssur burturstaddur.

**-red**

TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma og omma okkara

**Margith Joensen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.

***Vegna tey avvarðandi***

**Johanna Cathrina og Súsanna**

## Minningarorð um Andrias Eliesar Nolsøe

5. september 1950 - 11. september 2009



Eg kom at kenna Andrias Nolsøe, ella Andrias í Garðinum, sum hann eisini bleiv nevndur, á sumri 2001. Hann arbeiddi sum timburmaður á timburverkstaðnum, har eg fór undir mína útbúgving sum bygningssnikkari. Eg fann skjótt útav, at hesin maðurin dugdi sera væl at arbeiða. Hann var altíð fyrstur til arbeiðis og sum oftast seinastur heim. Hann var ómetaliga raskur og sera dugnaligur, tað var týðuligt at síggja. Andrias var sera skemtingarsamur maður og visti ofta »eina góða« at siga frá. Hóast hetta, var tað altíð meira arbeiði enn tos, tá hann arbeiddi, – og ein kaffileskur og eitt svart ball, var tað sjálvsagt eisini tíð til. Hann var ikki bangin at »taka fatt«, tað skuldi henda okkurt, har ið hann var.

Hann dugdi væl at læra frá sær og var altíð klárur at hjálpa bæði á arbeiðsplássinum og eftir loknan arbeiðsdag. Eg var so heppin at sleppa at arbeiða við hesum dugnaliga manni næstan alla mína lærutíð og eftir lokna lærutíð hevði eg ta gleði at sleppa at arbeiða við hesum góðsliga manni, bæði her heima í Suðuroy og norðanfjørðs, hesum eri eg sera takkksamur fyri.

Tey 8 árini, ið vit arbeiddu saman, vóru sera lærurík í allar mátar, og hevur hendan tíðin havt ógvuliga stóra ávirkan á mín persón og mítt lív, á ein so góðan og stóran máta, at tað finnast ikki orð fyri tí. At fáast við seyð dámdi honum eisini sera væl, at fara til fjals, at fletta, í hoyggjan og ikki minst, tá farast skuldi í feitlendi við veðrum.

Andrias var eisini húsligur maður, at dustsúgva og baka – helst pannukøkur – góðar pannukøkur var honum lítið fyri at gera. At hesin raski og góði maðurin, ið altíð var so væl fyri, skuldi gerast sjúkur og fáa henda bráða deyða, er mær óskiljandi.

Við hesum vil eg fegin siga takk fyri tað, ið tú lærdi meg um arbeiðið og lívið. Orð eru fátæk, men síðsta strokið er strokið av høvlinum hjá Andriasi her á fold. Eg vil við hesum fáu orðum biðja frið yvir minnið um Andrias.

Góða Hanna, Jón Eli og Annika, má Harrin fylgja tykkum.

**Tín góði vinur, Birgir**

Meira á síðu 16

## Sigvald Kristiansen á Skála 80 ár

Tann 30. apríl fyllir Sigvald Kristiansen, fyrrverandi kommunulækni á Skála 80 ár

Sigvald búði øll barnaárini í Fuglafirði. Foreldrini vóru Súsanna og Aleksandur Kristiansen, og var Sigvald tann fimti av sjey systkjum. Seinna helvtin av barnaárunum var eisini merkt av seinna heimsbardaga og ensku hermonnunum í bygdini.

Áftaná kríggið, fór hann til Havnar á preliminer- og síðani studentaskúla, og aftaná lokið studentsprógv gekk leiðin til Keypmannahavnar at lesa til lækna.

Í Keypmannahavn hitti hann Ásu Colbjørnsen úr Hesti, og giftust tey í 1955.

Tey eiga synirnar Súna, Arnbjørn, Regin og Boga. Eisini eiga tey 15 ommu- og abbabørn og trý langommu- og langabbabørn.

Sum lækni starvaðist Sigvald fyrst á Landssjúkrahúsinum í tvey ár, og á sjúkrahúsinum í gomlu Føroyingahavnini summarið 1964, áðrenn hann í 1965 gjørdist kommunulækni á Skála, sum tá var nýtt starv. Hetta starv hevði hann, til hann varð pensioneraður. Eisini skal nevnast, at Ása virkaði øll árini á Skála sum læknaskrivari.

Læknastarvið mundi helst vera strævið til tíðir. Í nøkur ár vóru bert tveir læknar í økinum, og eisini vóru nakrar bygdir, sum ikki høvdu fingið vegasamband.

Fyrstu árini var ein av vanligastu uppgávunum at trekkja tenn út. Onkuntíð vóru eisini boð eftir læknanum, tá onkur seyður ella hundur hevði brotið bein, ella tá ær skuldi lemba, og



ikki alt gekk, sum tað átti.

Sigvald hevur verið virkin ítróttarmaður og var við til at stovna Skála Ítróttarfelag. Hann hevur í nógv ár og er framvegis av trúgvastu spælarum, tá skálafólk savnast í høllini at spæla flogbólt.

Eisini hava Ása og Sigvald tryvist úti í náttúruni. Dagligir gongutúrar, bæði í bygdini, ímillum bygdir og í haganum. Sigvald hevur eisini skotið harur so at siga á hvørjum ári síðani tey búsettust á Skála, og hann súkklar framvegis nakrar km hvønn dag, um veðrið loyvir tí.

Sigvald var eisini við, tá skálamenn keyptu línubátin Leivur Hepni og bygdu hann um til nótabátin, ið fekk navnið Skálafossur.

Hann fekk sær bát, og bygdi neyst, tá hann búsettist á Skála, og var á floti ella skeyt fugl av og á, men tíðin hevur helst ikki verið so góð sum hugurin, so báturin varð við árunum ikki flotaður so ofta. Tá Sigvald so varð pensioneraður varð báturin skiftur út, men tíðin røkkur framvegis ikki til tann nógva útróðurin.

Aftaná at hann gavst sum lækni á Skála hevur hann ofta verið avloysari fyri aðrar læknar ella har læknastørv ikki vóru sett, mest í Vági, á Tvøroyri, á Sandi og í Klaksvík.

Sigvald og Ása hava trivist væl á Skála. Í 1983 keyptu tey hús á Skála, og har búgva tey framvegis.

Sigvald hevur verið í kirkjuráðnum í nógv ár, fram til síðsta kirkjuráðsval, og hann er framvegis virkin sum organistur í kirkjuni. Eisini hevur hann verið virkin í Meinigheitshúsinum á Skála.

Sigvald hevur leingi havt áhuga fyri viðurskiftunum hjá teimum eldru. Í starvi sínum sum lækni sá hann tørvin á einum heimi til eldri og óhjálpin fólk. Hann var longu við til tær fyrstu fyrireikingarnar til ellis- og røktarheim í Eysturoynni, og var eisini við í bygginevndini, tá heimið varð bygt.

Sigvald er nú formaður í Landsfelag Pensionistanna, har hann ofta hevur verið frammi í fjølmiðlunum og gjørt vart við viðurskifti hjá pensionistunum, og nýtur hann nógva tíð til hetta starvið.

Dagurin verður hildin í Meinigheitshúsinum á Skála, og byrjar borðhaldið kl. 17.